

Barents Sea Exploration Collaboration er eitt samstarv millum fimm oljufeløg sum øll hava virksemið í Barentshavinum. Mynd: Ole Jørgen Bratland

# Fimm oljufeløg fara at samstarva um oljuleiting í Arktis

**Jógvan Hugo Gardar**

22.04.2015 - 07:52

Oljan.fo

Statoil skal hava leiðsluna í einum bólki av fimm oljufeløgum sum hava gjørt avtalu um eina leitiætlan í Barentshavinum. Meiningin er at feløgini saman skulu gera royndir og læra av hvør øðrum, samstundis sum prísurin fyri leiting kann fáast at lækka, nú oljuprísurin er so lágur, skrivar Statoil.

Samstarvið millum feløgini er í fyrstu atløgu avmarkað til trý ár. Samstarvið kallast BaSEC (Barents Sea Exploration Collaboration). Við í samstarvinum eru Statoil, Eni, Lundin, OMV og GDF Suez. Hetta eru øll feløg sum hava leitiloyvir í Barentshavinum, ella sum longu hava funnið olju har, skriva Statoil í einum boðum.

Í løtuni verður ráoljan seld fyri nakað omanfyri 60 dollarar fyri fatið, samanborið við góðar 100 dollarar fyri fatið fyri einum ári síðani. Hetta ger at oljufeløgini leita eftir møguleikum til at minka um útreiðslurnar, samstundis sum tað eisini ger at tey royna at finna fleiri lummar av olju ella gass á hesum økjunum, sum kunnu gera lønsemi betri.

Statoil upplýsir at feløgini hava sett fleiri arbeiðsbólkar sum skulu arbeiða við datagrundarlagnum sum feløgini sita við, og tey skulu samskipa hetta so øll fimm feløgini kunnu fáa betri grundarlag tá talan er millum annaðum at skilja betri gongdina í veðrinum, hvørjir boripallar sum eru bestir til hesar uppgávurnar, arbeiðsumhvørvi og tilbúgving, sigur Statoil.